VEÐRIÐ

Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur greiðir frá um veðrið



Veðrið í dag:
Skrið ella stormur av útsynningi og stundum regn. Um kvøldið stívt andøvsgul av útsynningi og ælingur. Hitin millum 6 og 9 stig.



Veðrið leygardagin:
Stívt andøvsgul upp í hvassan vind av útsynningi, út á seinnapartin minni vindur. Ælingur, partvís vátakavi, men eisini sólglottar og hitin millum 2 og 5 stig.



Veðrið sunnudagin:
Stívt andøvsgul upp í hvassan vind av útsynningi og kavaælingur, men eisini sólglottar. Hitalagið millum ÷2 og +1 stig.

Veðrið mánadagin og týsdagin:
Mánadagin skrið ella stormur av landsynningi og suðri og stundum regn. Hitin millum 5 og 8 stig. Týsdagin skrið ella stormur av vestri og kavaælingur. Hitin um frostmarkið.

Yvirflóð í Kollafjarðar skúla

Kjallarin í Kollafjarðar skúla stóð hósmorgunin undir í vatni, og næmingarnir fingu frí

VATNFLÓÐ

Theresa S. Krogager og Annika S. Olsen

Seinastu dagarnar hevur verið nógvur kavi. Nú, tað er byrjað at regna, tiðnar kavin, og nakrir trupulleikar eru komnir burturúr. Áirnar vóru fyltar við ov nógvum vatni, og hetta hevur gjørt, at yvirflóð er komin summastaðni í Føroyum

Í Kollafirði stóð ikki væl til í skúlanum. Ein á, sum er millum skúlan og svimjihøllina, var lopin, og kjallarin fleyt í vatni.

Oljufýringin og málarin eru í kjallaranum, og orsakað av tí, var hvørki hiti ella streymur í skúlanum. Av hesi orsøk fingu næmingarnir frí.

Skúlin í Kollafirði hevði hósmorgunin fingið so nógv vatn inn, at skúlin noyddist at avlýsa skúlagongdina. Nú er alt vatnið fingið út, men umvælingin av málara og oljufýring fer at taka nakrar dagar

Mynd: Jens Kr. Vang

Nakrar dagar

Vatnið, sum var í kjallaranum, var longu fyrrapartin hósdagin pumpað út. Nú er at ikki er lætt at umvæla so nógv runa í kjallaranum, oljufýringina og málaran. Frá skúlanum siga tey, at umvælingin væntandi fer at taka alt vikuskiftið, og tí hava næmingarnir eisini fingið frí í fríggjadagin.

Hitalagið kring knøttin

Illulisat	÷13
Nuuk	–
Qaqortoq	÷6
Ammassalik	0
Saint John's	1
Halifax	2
Reykjavík	1
Seyðisfjørður	0
Tórshavn	0
Lerwick	2
Aberdeen	3
London	4
Tromsø	÷8
Bergen	÷1
Oslo	–
Stokkhólm	÷6
Keypmannah.	0
Helsinki	÷12
Moskva	÷11
Berlin	0
Warzawa	÷2
Kiev	0
Bukarest	0
Paris	4
Madrid	7
Róm	8
Malorca	12
Athen	11
Malta	11
Tunis	11
Beijing	5
New Dehli	19
Bangkok	29
Jakarta	28
Sydney	–
New York	0
Miami	22
Los Angeles	15
Meksikobýur	–
Panama	32
La Paz	–
Rio de Janeiro	–
Buenos Aires	30

LUFTTRÝSTIÐ



Eitt djúpt lágtrýst, 959 hPa yvir Grønlandsfjørðinum fer í landnyrðing og brúgvalagið haðani til Føroya fer eystureftir.

Lágtrýstið eystan fyri Hvarvið stendur mestsum í stað og brúgvalagið haðani til Føroya fer eystureftir og hevur kalda luft við sær.

HITALAGIÐ



Hitalagið mált frá 05/02 kl. 06⁰⁰– 06/02 kl. 06⁰⁰. Hitin í gjár: 3,0°
Minsti hiti máldur í febr.: ÷11,0° Mesti hiti máldur í febr.: 11,0°

AVFALLIÐ



Avfallið: 13,0 mm – mált frá 05/02 kl. 06⁰⁰–06/02 kl. 06⁰⁰
Avfallið higartil í februar: 24,4 mm

TURRIKLÆÐI
HÚGVUR
T-SHIRT
KEPPAR
og FLØGG

12. MAÐUR
www.footballsupporters.fo

JUNIOR
BUSS TAXA
KOYRING
pláss til 10 ferðandi
Tlf. 22 33 11
Eyðbjartur Danielsen
Pæturgøta 14 • FO-188 Hoyvík • Tórshavn

VESTFALLSKYRRINDI

1. febr.: Tendring
7. febr.: Mánin longst frá jørðini
9. febr.: Fyrra kvarter

Kelda: Almanakkin 2002

Dagur	Suðuroyar-/Vágafirði fp.	sp.	Skúvoyar-/Skopunarfirði fp.	sp.	Hestfirði/Sundalagnum fp.	sp.	Vestmannasundi fp.	sp.	Mykinesfirði fp.	sp.	Nólsoyarfirði fp.	sp.	2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp.	sp.	Leirvíksfirði/Haraldssundi fp.	sp.	Kalsoyar-/Svínoyarfirði fp.	sp.	Hvannasundi fp.	sp.	Fugloyarfirði fp.	sp.
7. feb	10.53	23.14	09.53	22.14	10.08	22.29	00.33	12.53	01.33	13.53	09.08	21.29	08.08	20.29	11.08	23.29	—	12.08	10.38	22.59	11.53	—
8. feb	11.32	23.51	10.32	22.51	10.47	23.06	01.14	13.32	02.14	14.32	09.47	22.06	08.47	21.06	11.47	—	00.29	12.47	11.17	23.36	00.14	12.32
9. feb	—	12.24	11.24	23.57	11.39	—	01.51	14.24	02.51	15.24	10.39	23.12	09.39	22.12	00.06	12.39	01.06	13.39	—	12.09	00.51	13.24
10. feb	00.57	13.30	—	12.30	00.12	12.45	02.57	15.30	03.57	16.30	11.45	—	10.45	23.19	01.12	13.45	02.12	14.45	00.42	13.15	01.57	14.30

5 707265 100050 >